# Mugu koyra eftir oyggj

**Frá í morgin, týsmorgunin, til fríggjamorgun mugu øll tey, sum ætla sær til Havnar til arbeiðis, koyra eftir Oyggjarvegnum. Tað eru boðini frá Landsverki, sum hevur valt at steingja vegin millum Sandvíkarhjalla og inn á Sund**



SAMFERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

"Vegna arbeiði verður Kaldbaksvegurin, frá íbindingini á Sandvíkarhjalla og inn á Sund, stongdur fyri allari ferðslu frá týsmorgni, 12. desember kl. 09.00, til fríggjamorgunin, 15. desember kl. 07.00. Í hesum sambandi verður víst til Oyggjarvegin."

Tað eru boðini frá Landsverki, og tey koma dátt við hjá mongum. Á heimasíðuni hjá Landsverk stendur, at Landsverk byggir land, men tað eru tey, ið hava ført fram, at Landsverk við hesum steingir landið.

Vit hava tískil ringt til stjóran í Landsverk, Oyvind Brimnes, og spurt hann, hví tey hava valt at steingja vegin á hávetri og nú veðurforsøgnin sigur upp í kolandi storm?

– Ætlanin er, at vegurin skal vera seyðafríur. Men skal tað vera, so er neyðugt við eini seyðasmogu undir vegin. Hana gera vit nú og tí steingja vit.

*Men er tað neyðugt at gera eina slíka smogu júst nú?*

– Ja. Tað er soleiðis, at fjarhitarør verða løgd frá Sundsverkinum til Havnar júst nú. Seyðasmogan má verða løgd undir hesi fjarhitarør, og tað er ikki nakað, sum kann gerast aftaná, men má gerast nú, sigur Oyvindur Brimnes.

*Meta tit, at tað er forsvarligt, at leiða ferðsluna um Oyggjarvegin, nú hann sigur upp í kolandi storm?*

– Ja, tað meta vit. Vit gera okkum altíð nakrar metingar, hvørt okkara avgerðir kunnu forsvarast. Nú gera vit so er serligan innsats fyri rudda og salta Oyggjarvegin, og skuldi tað hent seg, at tað vísir seg at vera óforsvarligt, at koyra eftir oyggj, so er tað soleiðis, at vit kunnu lata upp fyri ávísari ferðslu, sigur Oyvindur Brimnes.

*Hvussu er við neyðsynjarakførum, bussum og bygdaleiðum?*

– Tey mugu eisini koyra eftir Oyggjarvegnum sum øll onnur, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverk.

# Sera óheppið



**Tað heldur Jón Kragesteen um avgerðina hjá Landsverk, um at steingja Kaldbaksvegin. Men so leingi ventilurin er har, sum sigur at ferðslan kann koma ígjøgnum í ringasta føri, so nokk í lagi, heldur hann**

SAMFERÐSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Jón Kragesteen á Ferðslutrygd heldur tað vera sera óheppið, at Landsverk nú velur at steingja Kaldbaksvegin.

– Tað má vera ein øgiliga góð grund fyri hesum, sigur Jón Kragesteen, tá vit spurdu hann um eina viðmerking. Hann hevði tá, ikki hoyrt grundgevingarnar frá Oyvind Brimnes og fekk tískil ikki gjørt viðmerkingar til tær.

Tá hann hoyrir grundgevingarnar hjá Landsverkstjóranum, so sigur hann, at tað er honum ein lætti, at tað í ringasta føri fer at bera til at leiða ferðsluna eftir Kaldbaksvegnum.

– Tað er ein lætti, tí vit vita, at Oyggjarvegurin er vandamikil. Eisini um summarið, sigur Jón Kragesteen.

# Nýggjur altardúkur í Dómkirkjuni

**Anna Haraldsdóttir á Trappuni byrjaði í 1986 at gera nýggjan altardúk til Dómkirkjuna. Hon doyði tó árið eftir, men nú er dúkurin liðugt broderaður og varð tikin í nýtslu sunnudagin**

KIRKJA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sunnudagin var ein nýggjur altardúkur tikin í nýtslu í Dómkirkjuni. Talan er um ein heilt serligan dúk, sum Anna Haraldsdóttir á Trappuni, sála, byrjaði at brodera í 1986.

Anna ætlaði at brodera hendan dúkin til 200 ára haldið hjá kirkjuni, sum var í 1988. Hon doyði tó í 1987 og náddi tí ongantíð at gera dúkin lidnan.

Ein kona, sum er von at brodera, tók síðani dúkin til sín og hevur júst gjørt hann lidnan. Hon ynskir ikki at verða navngivin. Dúkurin er gjørdur til minnis um Onnu, sigur hon.

– Vit hava leingi ynskt okkum ein nýggjan altardúk, tí at hin er vorðin gamal. Vit hoyrdu um hendan dúkin, og at hendan konan var í holt við at brodera hann lidnan. Dúkurin hevur eina heilt serliga søgu, sigur Bente Kjær, sum situr í kirkjuráðnum fyri Dómkirkjuni.

Nú er dúkurin so klárur, og sunnudagin klokkan 11, annan sunnnudag í advent, var hann fyri fyrstu ferð nýttur á altarinum í Dómkirkjuni.



*Anna Haraldsdóttir á Trappuni, sála, byrjaði at brodera í 1986 og ein kona, sum er von at brodera, tók síðani dúkin til sín og hevur júst gjørt hann lidnan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*